# Strendur bjóðar seg fram til ferðavinnu



**Kunnleikin til Strendur er valla stórur hjá øðrum enn teimum, sum búgva ella arbeiða har. Bygdin liggur soleiðis fyri á landkortinum, at hon ikki er av fyrstu ferðamálum, sum fólk velja, tá tey tilrættisleggja sínar vitjanir undir ferðini í Føroyum, tíansheldur hjá føroyingum sjálvum. Nú vilja Strendur og strandingar á ferðakortið**

**Orð og myndir: Kári Mikkelsen**

Nógvir føroyingar kenna bert Strendur sum bygdina, tú mást koyra ígjøgnum fyri at koma til eina av hinum bygdunum í Sjóvar Kommunu, Selatrað, ið er eitt vælumtókt ferðamál.

Hesa hugmyndina av Strondum vilja bygdafólkini fegin broyta. Í januar skipaði kommunan fyri einum sokallaðum trivnaðardegi, har fólk komu saman fyri at umrøða trivnaðin í kommununi. Her var samstundis høvi til at svara spurningum um livikorini í bygdunum í Sjóvar Kommunu.

Arthur Johansen, borgarstjóri, er sera væl nøgdur við úrslitið av trivnaðardegnum.

– Hesin dagurin setti veruliga ljós á trivnaðin í kommununi, haldi eg, tað ber til at siga. Nógv hava vent sær til mín fyri at hoyra, hvussu tey kunnu koma í gongd við at fríðka umhvørvið í teimum ymsu grannaløgunum. Ætlanin er, at kommunan skal lata tilfar, og so skulu borgararnir koma við hugskotum og lata neyðugu arbeiðsorkuna til at fáa tingini gjørd, sigur Arthur Johansen.

Hann vísir á, at tey ymsu uppskotini sjálvandi skulu viðgerast og góðkennast av kommuni, so ein ávís stýring og skil er á tí, sum verður gjørt.

– Nógvir sjómenn eru í kommununi; eisini uppilagstir, og fleiri av teimum hava víst stóran áhuga fyri at vera við í arbeiðinum at fríðka um kommununa. Hesa stóru arbeiðsorku eiga vit at gera nýtslu av í strembanini eftir at økja um trivnaðin í kommunini, sigur borgarstjórin.

Á trivnaðardegnum varð kjakast um, hvussu arbeiðast kann fram ímóti at lata meira upp fyri fremmandafólki og harvið lokka fleiri tilflytarar til kommununa.

– Nógv hava kanska ta fatan, at Strendur er ein afturlatin og konservativ bygd. Gamaní hava vit – eins og aðrar bygdir – okkara stóru familjur og bindiklubbar, sum kunnu tykjast at hava nóg mikið í sær sjálvum. Kanska er tørvur á at arbeiða fyri eini hugburðsbroyting millum okkum bygdarfólk. Vit vildu tí fegin hoyra frá onkrum av teimum, sum eru komin uttanífrá, hvussu tað er at koma her sum fremmandur. At seta orð á hendan spurningin fingu vit okkara nýggja prest á Gjaranesi, og



*Ein væl hildin Sjóvar Kirkja er framvegis eitt prýði fyri bygdina*




*Bensinstøðin á Strondum fer í størri mun at lata dyrnar upp fyri ferðafólki, og skal virka sum eitt slag av móttøku við kunning um Sjóvar Kommunu*

tað eydnaðist væl, sigur Arthur Johansen.

### Vilja menna ferðavinnuna

Borgarstjórin á Strondum vísir á, at sum framhald av trivnaðardegnum kom tað sum kallað, at Sámal Bláhamar, sum eigur Toru Tourist, vendi sær til teirra við hugskotum um, hvussu ferðavinnan í kommununi kann mennast.

Einasta spunavirkið í landinum, Snældan, liggur á Strondum. Hetta er eitt upplagt ferðamál, har ferðafólk eisini hava møguleika fyri at leggja nakað eftir seg, heldur Sámal Bláhamar.

Hann greiðir frá, at tað var av tilvild, at hann kom at hugsa um Strendur sum ferðamál.

– Eg møtti Jacob Haugaard, sum er hálvur føroyingur, í Kastrup, og hann legði til merkis, at eg var í eini morreyðari troyggju. Eina slíka hevði hann átt og kundi fegin hugsa sær at fingið hendur á einari aftur. Eg fór tí ein túr inn til Snælduna á Strondum og greiddi teimum frá prátinum við Haugaard. Tað var leyst og liðugt, eg fekk eina troyggju við mær suður aftur og sendi hana niður til hann. Undir